# Tey lata sítt egna blóð fyri at onnur kunnu liva

**Ein heldur øðrvísi føroyskur filmur sær dagsins ljós næsta summar. Tað er ein filmur um, hvønn týdning tað hevur at summi eru til reiðar at lata blóð fyri at onnur kunnu liva**

BLÓÐGÁVA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Her fáa tveir klaksvíkingar silvurnál fyri at hava latið blóð 25 ferðir. Vinstrumegin er tað Sigurd Syderbø og hin er Ziska Joensen sum fáa nálirnar. Tað er Sigrid Niclasen sum handar teimum nálina og ytst til høgru stendur Karin Jacobsen og hyggur at*
*Myndina tók Ólavur Samson*

– Hvør blóðgáva kann verða við til at bjarga fleiri mannalívum, Tí er tað so ómetaliga týdningarmikið, at tað altíð er nokk av fólki, sum er til reiðar at lata blóð.

Òlavur Samson er virkin blóðgevari í Klaksvík og hann heldur, at tað hevur stóran týdning at upplýsa fólki um, hvønn týudning tað hevur, at føroysku sjúkrahúsini altíð hava nóg mikið av blóðgevarum.

Og nú eru blóðgevararnir í Klaksvík farnir undir eitt heldur óvanligt tiltak. Teir eru nevniliga farnir undir at gera ein upplýsandi film um, hvussu stóran týdning tað er, at fólk bjóða seg fram at geva blóð.

Ólavur Samson sigur, at tað eru teir báðir Jógvan Eliasen og Niclas Heri Jákupsson, sum gera filmin, ið varar 10 - 15 minuttir.

Aðalskrivarin í danska blóðgevarafelagnum, Niels Mikkelsen, sum eisini er í altjóða blóðgevarafelagnum, FIODS, er ráðgevari fyri at geva filminum ta røttu, fakligu vektina.

## Eggja fólki til at verða blóðgevarar

Endamálið við filminum er at eggja fólki til at bjóða seg fram at lata blóð.

– Hetta er ein filmur, sum skal vísast í sjónvarpi og hann skal vísa álvaran í, at sjúkrahúsini altíð hava nokk av blóði.

Hann verður gjørdur á breiðbandi, so at tað eisini skal bera til at selja hann á øðrum málum.

Filmurin er komin væl áleiðis og tey hava sett nøsina upp eftir at filmurin skal vera liðugur næsta summar.

– Ætlanin er at gera ein dag í árinum til altjóða blóðgevaradag. Tað er sumt sum bendir á, at hesin dagurin verður 11. juni og vit miðja ímóti at filmurin verður liðugur tá, sigur Ólavur Samson.

– Filmurin skal vísa, hvussu blóð verður latið og, hvussu blóð verður brúkt.

Hann sigur, at í sambandi við vanlukkur er tað viðhvørt brúk fyri heilt nógvum blóði í einum og tí hevur tað alstóran týdning, at tað altíð er nóg mikið av blóðgevarum, sum altíð eru til reiðar at fara á sjúkrahús í skundi at lata blóð, eisini tá ið teir verða vaktir mitt á nátt og teir verða noyddir at bróta svøvn.

Men tað eru eisini fólk, sum hava ymsar sjúkur sum gera at tey kunnu ikki liva, uttan at tey regluliga fáa ymisk evni, sum er vunnið úr blóði frá øðrum og sostatt kann ein blóðgáva verða við til at bjarga fleiri mannalívum, alt eftir, hvat teimum bagir og hvørjum tilfari úr blói, tey hava brúk fyri.

## Klaksvíkar upp í altjóða samstarv

Klaksvíkar Blóðdonorlið, er eitt virki felag og tað hevur nú meldað seg inn í altjóða felagið, FIODS, sum er altjóða felagið fyri blóðgevararar.

Millum annað gevur hetta okkum møguleika at senda ung fólk uttanlands at læra, hvussu vit best eggja fólki til at gerast blóðgevarar.

Annars skipar Klaksvíkar Blóðdonorlið fyri hugnakvøldið um hesa tíðina hvørt ár. Í ár var hugnakvøldið mánakvøldið í matstovuni á Klakvíkar Sjúkrahúsi, har borðreitt var við smurdum bitum, mandlurísi, kaffi, te og kaku.

Tað vóru eini 80 fólk á fundi, har eisini áðurnevndi Niels Mikkelsen helt fyrilestur um ymisk viðurskifti, sum hava við blóðgávu at gera og um, hvussu hesi viðurskifti eru skipað uttanlands.

Ì nevndini í Klaksvíkar Blóðdonorlið eru Òlavur Samson, Karin Jacobsen, og Kristian Jørgensen.

Sjálvur letur Ólavur Samson væl at støðuni í Klaksvík. Í Klaksvík eru einir 350 blóðgevarar og hann sigur, at tilgongdin er størri enn frágongdin.

– Eftir altjóða viðurskiftum er tað áleið. Men tað besta er, at 10 % av fólkinum eru blóðgevarar.

– Okkara endamál, sum blóðgevarar, er, at tað skal altíð verða nóg mikið av blóði á goymslu í Føroyum og at tað skal altíð vera nóg mikið av blóðgevarum, eisini tá ið ein vanlukka hendir, sum krevur stórar nøgdir av blóði í einum.

Ólavur Samson sigur, at endamálið við at vera blóðgevari er ikki júst, at tú skalt verða boðsendir tvær ferðir um árið at lata blóð.

– Tað er í lagi, at blóðgevarar ógvuliga sjálvdan, ella ongantíð verða boðsendir. Endamálið er, at sjúkrahúsið altíð hevur nokk av fólki at heita á, tá ið brákomin tørvur á blói stingur seg upp, og tað kann vera so skjótt, tí tá ið ein vanlukka hendir, er tað altíð sum snarljós úr bláum lofti.

Verður tað brúk fyri so nógvum blóðgevarum í framtíðini, nú Ùtvarpið segði at sviar høvdu gjørt blóð, sum teir høvdu givið einum sjúklingi?

– Ja, Niels Mikkelsen segði at tað vóru so nógvir trupulleikar við tí gjørda blóðinum og at hann hevði ilt við at síggja annað enn at tað altíð fer at verða neyðugt við blóðgevarum.

Tað tekniska í hesum sær hann seg ikki føran fyri at koma inn á, men tað segði so hesin Niels Mikkelsen, sum fylgir gjølliga við gongdini.

Tey, sum hava alnet og hava áhuga í at vita meiri um blóðgávur, kunnu fara inn á www.fiods.org



*Niels Mikkelsen, aðalskrivari í danska blóðgevarafelagnum og limur í altjóða felagnum fyri blóðgevarar, FIODS, sigur, at tað fer altíð at verða brúk fyri blóðgevarum, hóast sviar nú hava gjørt blóð, tí tað eru so nógvir trupulleikar við gjørdum blóði*



Oyndarfjørður:

# 3.000 tons av laksi skulu takast

**Herfyri kom hol á ein av aliringunum, sum liggja á Oyndarfirði. Hetta er nakað, sum hendir av og á, men í hesum førinum er tað so óheppið, at ILA-smitta er staðfest á Oyndarfirði, og tí er vandi fyri, at smittaður laksur er sloppin út**

LAKSUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*Fyri nøkrum mánaðum síðan varð ILA-smitta staðfest í alibrúkinum hjá Norðaling á Oyndarfirði, og mangt bendir nú á, at ILA-smittaður fiskur er sloppin úr tí eini nótini. - Men fiskurin í júst hesi nótini bar ikki sjónlig tekin um sjúku, siga tey á Vestlaksi*

Tað er felagið, Norðaling, ið Vestsalmon rekur, sum eigur aliringarnar og fiskin á Oyndarfirði.

Á Vestlaksi, sum er eitt av feløgunum í "ketuni", siga tey, at óvist er, hvussu leingi hol hevur verið á nótini í tí eina aliringinum. Enn er fiskurin, sum eftir gongur í ringinum, ikki tikin, og tí er eisini óvist, hvussu stórt tal av laksi er sloppið úr nótini.

## Ikki sjúkur

Fyri nøkrum mánaðum síðan varð ILA-smitta staðfest í alibrúkinum hjá Norðaling á Oyndarfirði, men á Vestlaksi siga tey, at fiskurin í ringinum, sum hol kom á, var ikki sjónliga sjúkur.

– Eingin fiskur doyr í hesum ringinum, og sjónlig tekin eru ikki til sjúku, siga tey á Vestlaksi.

So skjótt, funnið varð út av, at hol var á nótini, varð nótin bøtt, og síðan er eingin fiskur sloppin út.

## 3000 tons

Á Oyndarfirði svimja 1,4 milj. laksar, og nú ILA-smitta er staðfest, verður fiskurin tikin so við og við.

Tað er P/F Kryvjing í Klaksvík, sum slaktar og kryvur fiskin fyri Norðaling.

Ein brunnbátur við lokaðum ventilum flytur laksin av Oyndarfirði til Klaksvíkar.

Á Vestlaksi siga tey, at meginparturin av fiskinum á Oyndarfirði er tøkuførur, og tað er tann størsti fiskurin, sum fyrst verður tikin.

# Vandi er fyri at laksurin smittar

**- Tað skal næstan meira enn vanligt hepni til, um ILA-smittaði laksurin ikki smittar onnur alibrúk í landinum, sigur landsdjóralæknin, Bjørn Harlou**

LAKSUR OG ILA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*– ILA-smitta finst eisini í villum laksi, og eingin ivi er um, at smittan er eldri enn øll aling. Men munurin er tann, at fiskurin í einum aliringi gongur so tættur, og tí gerst sjúkan meira umfatandi, enn tá ið hon rakar villan laks, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni*

Landsdjóralæknin, Bjørn Harlou, heldur, at stórur vandi er fyri, at ILA-smittaði laksurin, sum er sloppin úr aliringinum í Oyndarfirði, fer at smitta laks í øðrum alibrúkum í landinum.

Tað er ógvuliga óheppið, at slíkt hendir, men spurningurin er, hvussu byrgjast kann uppfyri tílíkum óhappum.

## Fleyt omaná

– Vit vita ikki enn, hvussu nógvur laksur er sloppin út, tí enn er laksurin, sum svimur eftir í nótini, ikki tikin, sigur Bjørn.

Hann vísir á, at var talan um nakrar fáar laksar, hevði vandin fyri smittu ikki verið so stórur, men í hesum førinum er líkt til, at tað er eitt stórt tal, sum er sloppið úr nótini.

Bjørn sigur, at teir, sum eiga alibrúkið á Oyndarfirði, løgdu til merkis, at fóðurið, sum fer í ringarnar, ikki bleiv uppetið.

– Stórur partur av fóðurinum fleyt omaná sjónum, og tí varnaðust menn, at okkurt var áfatt. Tá ið nótin varð kannað, sást, at hol var komið á, sigur hann.

Tað var í mars í ár, at ILA-smitta varð staðfest á Oyndarfirði, men á Vestlaksi siga tey, at sjónlig tekin eru ikki um sjúku í umtalaðu nótini, sum hol kom á.

– Tá ið smittan er staðfest í alibrúkinum, kunnu vit rokna við, at laksurin í nótini antin var smittaður – ella, at smittan var ávegis, sigur Bjørn.

## Villur laksur

Vit spurdu eisini Bjørn Harlou, um ILA-smitta stavar frá aling – ella, um hetta er ein sjúka, sum laksur altíð hevur borið.

Hann sigur, at ILA-sjúka finst eisini í villum laksi, og eingin ivi er um, at smittan er eldri enn øll aling.

– Fiskurin í einum aliringi gongur tættur, og tí gerst sjúkan meira umfatandi, enn tá ið hon rakar villan laks. Villur laksur, sum gerst sjúkur, kann saktans doyggja, áðrenn hann smittar annan villan laks. Viðurskiftini í náttúruni kunnu ikki samanberast við viðurskiftini í eini alinót, sigur landsdjóralæknin, Bjørn Harlou, at enda.

# Æðuvíkingur í Kanada 101 ár

**Kristian Sofus Davidsen fór úr Føroyum í 1920-unum og hevur ongantíð vitjað aftur á klettunum. Tá ið hann fylti 100 ár í fjør, vóru ættarfólk úr Føroyum og vitjaðu**

FØÐINGARDAGUR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Í gjár, 6. november, fylti æðuvíkingurin, Kristian Sofus Davidsen, 101 ár.

Kristian, sum býr í Kanada, flutti úr Føroyum fyri mongum árum síðan og hevur ongantíð vitjað aftur á klettunum.

Tá ið Kristian í fjør fylti 100 ár, vóru ættarfólk hjá honum úr Føroyum í Kanada og vitjaðu.

Eins og aðrir føroyingar tá á døgum, fór Kristian úr Føroyum í 1920-unum at finna sær arbeiði.

Hann búsetti seg í Kanada og hevur sum nevnt ongantíð vitjað aftur í Føroyum øll hesi mongu ár.

Tey, ið vitjaðu Kristan á hansara 100 ára føðingardegi í fjør, høvdu ein góðan túr har yviri.